Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Kunngerðin um alment útboð av kommunalari fastogn

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at kunngerðin um alment útboð av kommunalari fastogn er nøktandi, til tess at kommunur kunnu skunda undir bústaðarbygging?
2. Um nei, eru ætlanir at broyta kunngerðina til tess at tryggja bústaðarbygging?

Viðmerking:
Fyri nøkrum árum síðani varð sjálvsognarfelag stovnað í Havnini. Í hesum felag vóru einar 50 familjur, ið høvdu tikið seg saman til tess at byggja alternativar bústaðir í Marknagili í Havn. Talan var um familjur, ið ynsktu at búgva í Føroyum, og fleiri av teimum høvdu ætlanir um at flyta heim, eftir at hava búð uttanlands. Ætlanin var at fáa fatur á einum lendi á 21.000 m^2 og fara undir eina bygging, sum minti um byggingina í Tórsbyrgi í Tórshavn. Ein verkætlan, sum hevði kunnað givið 50 familjum tak yvir høvdið.

Verkætlanin strandaði, tí Tórshavnar kommuna hevði ikki heimild at selja sjálvsognarfelagnum lendið, uttan at lendið varð boðið alment út. Hóast Tórshavnar kommuna í fleiri umførum heitti á landsstýrið um at loyva hesum ella at fáa kunngerðina broytta, so bar hetta ikki til.

Kommunurnar hava nú fingið møguleika at stovna almannagagnlig bústaðarfeløg, og tað er gleðiligt, men um so er, at 5-10 familjur taka seg saman um eina bústaðarbygging, ella eitt nú 10 eldri fólk ynskja fara undir at byggja eldraíbúðir í felag, so er hetta ikki møguligt.

Stórt bústaðartrot er, og tí er spurningurin, um ætlanin er at geva kommununum rásarúm at útvega lendi, tá talan er um gagnligar og skilagóðar verkætlanir, sum kunnu bøta um bústaðarneyðina.

Á Løgtingi, 17. januar 2025

Annika Olsen